# Norðoyaredaktiónin við nýggjari manning

LOKALREDAKTIÓN
*Snorri Brend*

**Klaksvík:** Nú fáa klaksvíkingar og norðoyingar aftur høvið til at fáa beinleiðis samband við blaðfólk hjá Sosialinum. Frá komandi viku verður redaktiónin í Nólsoyar Pálsgøtu 1 opin tríggjar dagar um vikuna frá kl. 9 til 12.

Tað var eitt stórt stig sum Sosialurin tók á sinni, tá vit lótu upp lokalredaktiónir kring landið. Eisini klaksvíkingar merktu til hesa satsingina.

Í blaðheiminum er tað altíð soleiðis, at fólk koma og fólk fara. Soleiðis hevur redaktión okkara í Klaksvík eisini merkt til skiftið av starvsfólkum á Sosialinum, og tí hevur redaktiónin ikki altíð hevur verið opin sum ætlað.

Men nú skal broyting koma í: Nú fer lokalredaktiónin í Klaksvík til verka aftur, hesaferð við trimum av blaðfólkum okkara.

Longu mánadagin kl. 9 fara klaksvíkingar at merkja til hetta.

Tríggjar dagar um vikuna

Skipanin verður soleiðis, at trý av blaðfólkum okkara fara at skiftast um at manna redaktiónina:

Mánadag fer Vilmund Jacobsen at vera fastur maður á redaktiónini. Mikudag verður tað Snorri Brend og hósdag Anna V. Ellingsgaard sum manna redaktiónina. Møguleiki er sjálvandi fyri at tey býta um dagar, skuldi tað gjørst neyðugt.

Men mánadag, mikudag og hósdag verður so altíð eitt blaðfólk á redaktiónini í Nólsoyar Pálsgøtu 1 í Klaksvík.

Uppgávurnar hjá hesum fólkunum verða at dekka tíðindi úr Klaksvík og Norðoyggjum annars.

Tað fer eisini framhaldandi at bera til hjá viðskiftafólki okkara at koma inn á gólvið hesar dagarnar við heilsanum, lýsingum til lýsingartorgið, lesarabrøvum ella viðmerkingum, tilfar til Nøvn í vikuni og annað viðkomandi, sum norðoyingar ynskja skal koma í blaðið. Til ber eisini at gjalda fyri lýsingarnar og heilsaninar á redaktiónini.

So verð vælkomin at vitja redaktiónina mánadagin kl. 9.

Adressa: N. Pálsg. 1
Tlf.: 458686 og 458685
Fax: 458687
Teldupostur:
klaksvik@sosialurin.fo

# Fantastiskt at sleppa til Føroya at framføra

**Høvuðsnavnið á konsertini, sum var í býráðssalinum hjá Runavíkar Kommunu í gjárkvøldið, var Ida Kellemann Thomsen úr Hirtshals**

KONSERT
*Lív Reinert Kjeld*
*liv@sosialurin.fo*

16 ára gamla Ida Kellemann Thomsen hevur spælt klassiskt klaver í musikkskúlanum í Hirtshals í níggju ár. Hon gongur í fyrsta flokki í studentaskúla, umframt at hon dúgliga venur klaver í musikkskúlanum, har hon er sloppin at ganga í »Talentklasse«, har einans átta næmingar ganga. Hetta er eitt satt bragd, tá ið hugsað verður um, at umleið 1.400 næmingar frá 0-25 ár ganga í musikkskúlanum í Hirtshals.

Tey átta, sum ganga í talentflokkinum, fáa tvær ferðir so nógva undirvísing, sum hini í musikkskúlanum. Harumframt hava tey annanhvønn mánað eitt, sum tey kalla »Performance-Class«, sum merkir framførsluflokkur. Tá framføra tey hvør fyri øðrum í flokkinum, og tosa um, hvat var gott, og hvat kundi verið gjørt betur. Afturat hesum syrgja tey eisini fyri at fáa eina góða tónleikauppliving hvønn mánað.

Í musikkskúlanum hevur Ida hoyrilæru og tónleikateori umframt klaverundirvísing. Lærarin hjá henni eitur Birgitte Zielke. Hon hevur verið lærari hjá Idu seinastu fimm árini. Tá ið hon varð biðin um at siga nøkur orð um Idu, áðrenn hon fór at spæla, segði hon, at Ida er sera musikalsk. Umframt klavervenjingina syngur hon eisini í tveimum kirkjukórum og einum kóri á studentaskúlanum.

– Hun er en dejlig, musikalsk pige at arbejde med, segði Birgitte smílandi um næmingin hjá sær.

Tá ið Ida varð spurd, um hon var von við at ferðast og spæla konsertir, svaraði hon, at hetta var fyrsta ferðin, at hon varð biðin um at koma so langt.

– Tað er heilt fantastiskt at sleppa til Føroya at framføra!

Tá ið Ida setti seg við klaverið, hevði hon ongar nótar at halda seg til. Hon spældi eina góða løtu, og tað kendist beinanvegin, at hetta var nakað heilt serligt. Hon livdi seg heilt inn í tónleikin, og áhoyrararnir vórðu veruliga drignir við av hennara fantastisku framførslu. Sum frásøgumaðurin Jóannes S. Hansen segði eftir konsertina:

– Ida er ein lítil genta, men ein stórur tónleikari.



*16 ára gamla Ida Kellemann Thomsen var høvuðsnavnið á konsertini í Runavík mánakvøldið*


## Starvsfólk til Bilasøluna

Bilasølan er í støðugari menning og fyri at styrkja um tænastuna, sóknast vit eftir starvsfólkum at byrja skjótast tilber.

**Lærlingur til eykalutagoymsluna**
Arbeiðið fevnir um goymslustýring, bílegging og sølu av eykalutum bæði til verkstaðin og beinleiðis til viðskiftafólk okkara. Vit leita eftir einum fyrikomandi persóni, ið er nærlagdur og dugir at fáast við fólk.
Tað er ein fyrimunur um umsøkjari hevur FHS prógv .
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Rógva Sigurðsson á tlf. 315354.

**Lærlingur og sveinur til bilaverkstaðin**
Arbeiðsuppgávurnar fevna um alskyns mekaniskar og tekniskar umvælingar og eftirlit av teimum bilamerkjum, ið bilasølan umboðar. Bæði lærlingur og sveinur verða partur av einum samansjóðaum toymi, ið skal tryggja, at dygdin er í hásæti og at tíðarætlanir verða hildnar.
Fyri at søkja starvið sum lærlingur til bilaverkstaðin, er tað ein treyt at viðkomandi hevur 10. floks fráfaringarprógv fólkaskúlans.
Fyri sveinin til bilaverkstaðin, er tað ein fyrimunur um viðkomandi hevur kunnleika til CAN-BUS og til nýmótans kanningar-, eftirlits- og royndarskipanir.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Anton Jacobsen á tlf. 315354.



Umsóknir, við viðkomandi skjølum, skulu verða okkum í hendi seinast 1. nov. 2005 og sendast til:

**Bilasølan P/F**
**Postboks 3192**
**Vegurin Langi**
**110 Tórshavn**

Audi SEAT Porsche mazda
**Bilasølan P/F**
Vegurin Langi






## Starv í Saltangará

Til KT-handil okkara í Saltangará søkja vit eftir fólki M/K at byrja skjótast tilber. Com-Data hevur tveir handlar, ið selja alt innan teldu og teldutilhoyr. Stórur dentur verður lagdur á at selja føroyskar skipanir og veita tilhoyrandi tænastur.

Arbeiði umfatar alt, sum hevur við handilin at gera. Kundarøkt, telefonavgreiðsla og samskifti millum deildirnar verður eisini partur av arbeiðsuppgávuni.

### Førleiki
- Evni at seta seg inn í nýggja tøkni
- Kunnleika um kunningartøkni
- Evni at samstarva við onnur í fyritøkuni

### Umsókn
Umsókn við avriti av prógvum, viðmælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 1. november 2005 og sendast til

Com-Data Pf.
att. Heini Hansen
Stangavegur 53
FO-700 Klaksvík

heini@com-data.fo

COM-DATA P/F

Postboks 19 | 700 Klaksvík | Tel. +298 476100
Postboks 204 | 600 Saltangará | Tel. +298 449840